# Suðuroyingar fáa skipið teir vilja hava



*Soleiðis sær tað nýggja Suðuroyarskipið út. Hetta er eitt framtíðarskip, men tað er púra burturvið at samanbera tað við Norrønu, tí tað eru heilt hvør sítt skip, til heilt hvør sítt endamál, sigur stjórin á Strandferðsluni*

**Tað er ikki uttan treytir, at landsstýrið nú hevur samtykt at byggja eitt suðuroyarskip**

SUÐUROYAR-SIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*

Fríggjadagurin var ein stórur dagur fyri Suðuroynna.

Tí tá samtykti Landsstýrið loksins um at byggja nýtt suðuroyarskip.

Men ikki bara tað. Skipið, sum Landsstýrið samtykti at byggja, er júst tað skipið, sum suðuroyingar vildu hava og sum teir hava arbeitt hart fyri at fáa.

Tað eru annars tveir mánaðir síðani, at landsstýrið fekk málið at taka støðu til og heilt til tað síðsta var óvissa um, hvussu tað nýggja suðuroyarskipið fór at síggja út.

Men fríggjadagin samtykti landsstýrið so at fylgja tilmælinum frá verkætlanarbólkinum, sum hevur fyrireikað bygginginga.

Sostatt samtykti landsstýrið at byggja eitt skip, sum er 135 metrar langt og sum siglur 21 míl. Tað ger, at ferðin ímillum Havnina og Tvøroyri fer at taka 1 tíma og 37 minuttir.

Tað er gott og væl ein hálvur tími skjótari enn í dag, tí nú tekur túrurin 2 tímar og 15 minuttir. Men harafturat skal leggjast øll bíðitíðin, sum tað nú er neyðugt at standa í bilaraðnum fyri at tryggja sær pláss. Harafturat er Smyril mangan ov seinur úr Havn, tí tað er so trongligt og óarbeiðsligt umborð, at tað tekur so langa tíð at lasta hann.

So samanlagt tekur tað mangan tríggjar tímar at koma úr Havnini til Suðuroynna og tað er tað saman sum tað tók við gamla Smyrli, sum varð áðrenn hendan.....

Suðuroyarskipið, sum nú verður bygt, er so mikið stórur, at tað man neyvan nakrantíð koma fyri, at hann er ov lítil.

## Ikki uttan treytir

Men tað var ikki uttan treytir, at landsstýrið samtykti at byggja hetta skipið.

Bjarni Djurholm, landsstyrismaður í samferðslumálum, sigur, at tað er eitt ófrávíkiligt krav, at skipið verður bara brúkt til innanlandssigling.

– So er tað nakar, sum hevur dúva uppá ,at hetta skipið eisini skal brúkast til at taka skotlandssiglingina uppaftur við, er tað til fánýtis, tí tað fer ikki at henda, sigur landsstýrismaðurin.

Ein avgerandi spurningur, sum eisini skal kannast út í æsir, er, hvussu nógv tað kostar at byggja skipið.

Fyribils vísa útrokningarnar, at tað kostar 305 milliónir at byggja skipið í Evropa, men at tað kann byggjast fyri 255 milliónir í Kina.

Bjarni Djurholm sigur, at ein treyt við skipinum er, at verður tað bygt í Kina, skal tað kannast út í æsir, at dygdin í skipinum svarar við tey krøv, sum vit her um okkara leiðpir seta til slík skip. Fær Strandferðslan ikki trygd fyri tí, skal skipið byggjast í Evropa.

Landsstýrismaðurin sigur, at nú fær Strandferðslan boð um at seta byggingina í verk.

# Nýggja suðuroyarskipið kann verða liðugt í 2003

**Men tað er ein treyt frá landstýrinum, at havnaviðurskiftini í Suðuroynni verða loyst samstundis. Stjórin á Strandferðsluni veit ikki, um tað fer at seinkað ætlanini at byggja ein nýggjan Smyril**

SUÐUROYAR-SIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*

Gongur alt væl í hond kann tað nýggja suðuroyarskipið verða liðugt seint í 2003.

Men skal tað eydnast, skulu ymsar forðingar fáast av vegnum fyrst.

Reidar Nónfjall, stjóri á Strandferðsluni, sigur, at tá ið landsstýrið samtykti at byggja tað nýggja suðuroyarskipið, var tað ein treyt, at havnaviðurskiftini í Suðuroynni verða loyst samstundis.

Reidar Nónfjall, stjóri á Strandferðsluni, sigur, at hann veit ikki, um hetta fer at seinkað ætlanini eitt sindur.

Men í øllum førum heldur hann, at í 2004 skal ein endi síggjast á allari verkætlanini, tvs, bæði á tí nýggja suðuroyarskipinum og á arbeiðnum at byggja skipinum nøktandi atløgupláss.

Hann sigur, at hann skilir væl, at landsstýrið vil hava málið um havnaviðurskiftini í Suðuroynni loyst samstundis sum tað nýggja skipið verður bygt.

– Hetta nýggja skipið er so mikið effektivt, at eru havnaviðurskiftini ikki nøktandi, dettur allur tann fyrimunurin á gólv.

– Skipið er so effektivt, at tað ber til at fáa fólk og farm íland og umborð ísenn. Men tað nyttar alt onki, um tað er ein fløskuhálsur á landi, sum forðar fyri teimum møguleikunum

Hann sigur, at tað, sum nú hendir, er, at Strandferðslan, Vinunmálastýrið og Landsverkfrøðingurin mugu seta seg saman at leggja eina tíðarætlan fyri, hvussu alt arbeiðið skal fáast frá hondini.

Annars sigur hann, at av tí at Landsstýrið fylgdi tilmælinum frá verkætlanarbólkinum, hevði tað borið til at sett arbeiðið lutfalsliga skjótt ígongd.

– Tað er ein misskiljing, tá ið tað hevur verið ført fram, at vit ongan veg eru komin at fyrireika hetta ávísa skipið. Vit eru komin langt í fyrireikingunum. Skipið er at kalla liðugt projekterað og nógvar útrokningar eru gjørdar, so fyri tað hevði borið til at komið skjótt ígongd, sigur Reidar Nónfjall.

Stjórin á Strandferðsluni sigur, at verður tað tí ikki neyðugt at bíða eftir havnini, kann tann upprunaliga tíðarætlanin haldast, sum sigur, at skipið skal vera liðugt seint í 2003.

– Men tað veldst alt um, hvussu skjótt tað ber til hjá Landsverkfrøðinginum at gera samferðsluhavnina í Suðuroynna lidna.

## Fyrireika bygging

Magnus Magnussen tekniski leiðari á Strandferðsluni, sigur, at tað sum nú fer at henda, táið tað er klárt at fara ígongd, tað er, at tilfarið um tað nýggja skipið til einar 10 úrvaldar skipasmiðjur, har tær verða bidnar um ein prís.

– Tá ið tær hava latið boðini innaftur, verða einar tvær, tríggjar av teimum aftur valdar út at geva eitt endaligt tilboð og so kann kjølurin strekkjast. Gongur alt, sum eftir ánni, kann byggingin byrja longu í ár.



# Skræddaraseymað til suðuroyarsiglingina

**Skipið, sum landsstýrið hevur samtykt at byggja til suðuryarsiglingina, er skræddaraseymað til endamálið, sigur Strandferðslan**

SUÐUROYAR-SIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*

– Tað nýggja suðuroyarskipið, sum landsstýrið nú hevur samtykt at byggja, er í allar mátar eitt væla skip.

Tað eru bæði stjórin og tekniski leiðarin á Strandferðsluni samdur um. Tí dylja teir heldur ikki yvir, at teir eru sera vælnøgdir, nú Landsstýrið samtykti at fylgja tilmælinum, sum verkætlanarbólkurin , ið hevur fyrireikað bygginginа, hevur mælt til.

Nýggi Smyril verður 135 metrar langur og 22,7 metrar breiður og hann stingur 5,6 metrar. Talan er um eitt rættilgia lágt skip, sum er betri egnað til eina farleið, sum hesa m.a. tí at tað tekur ikki so nógvan vind á seg. Skipið hevur 20.900 hestakreftir, sum geva honum eina vanliga siglingarferð upp á 21 míl. Um summarið tekur hann 975 ferðafólk og um veturin 800. Men tað besta av øllum er: Hann hevur sitipláss til øll. Tað hevur Smyril sum er, verri enn so.

Nýggi Smyril tekur einar 30 trailarar, ella 200 persónbilar. Ikki minst á biladekkinum verður nýggja skipið eitt sera stórt framstig. Biladekkið er væl hægri og væl rúmligari enn á Smyrli, sum nú er. Tað verður gongubreyt í biladekkinum, so at tað verður óneyðugt hjá fólki at ganga og trokast ímillum bilarnar. Og tað verður gott pláss í millum hvønn bilin. Magnus Magnussen sigur, at tað verða 60 sentimetrar ímillum hvønn bil og teir bilarnir, sum standa úti í borðinum, hava 30 sentimetrar av fríplássi út í síðuna.

Hann verður bygdur sum eitt havgangandi skip. Tað merkir m.a. at hann hevur spíska gron og sker seg ígjøgnum alduna ístaðin fyri at trampa, sum hesin Smyrilin ger. Hann er eisini útgjørdur við stabilisatorum.

– Sostatt verður hetta eitt munandi róligari skip at sigla við, enn Smyril, sum nú er, siga stjórin og tekniski leiðarin á Strandferðsluni.

– Nýggi Smyril hongur eisini við tungolju, sum ikki kostar meiri enn gott helvtina av tí, sum vanliga oljan kostar. Tað er ein orskøk til, at nýggja suðuroyarskipið er bíligari í rakstri enn Smyril, sum nú er, hóast hann er væl størri og hevur meiri enn tvær ferðir so stóra maskinorku.

Nýggi Smyril hevur 100 koyggjur. Hann hevur eisini tyrlupall, tí tað skulu øll so stór skip nú hava. Men tað gevur honum eisini ein einastandandi møguleika at vera til hjálpar, um ein vanlukka, t.d. skuldi hent á einum boripalli. Annars hevur hann sjúkrarúm og lyftir, so at tað ikki longur verður neyðugt hjá sjúklingum at liggja í sjúkrabilinum á dekkinum á allari ferðini. Harumframt hevur hann fundarhøli og aðrar nýmótans hentleikar.

Annars sigur strandferðslustjórin, at ætlanin er at leggja projektið fram fyri almenninginum á fundi í Suðuroynni, sum væntandi verður fyrst í mai mánaða. Tað væntar hann eisini at vita meiri um, nær skipið verður liðugt.

| Alternativ | 19 míl | 21 míl | Smyril (16,5 míl) |
|---|---|---|---|
| **Dimensiónir** | | | |
| Siglingartíð | 1 t 47 min | 1 t 37 min | 2 t 4 min |
| Longd pp. (m) | 111,0 | 123,0 | 87,52 |
| Longd oa. (m) | 121,0 | 135,0 | 92,66 |
| Breidd (m) | 20,65 | 22,70 | 16,52 |
| Djúpd (m) | 5,60 | 5,60 | 4,65 |
| Tal á trailarum | uml. 21 | uml. 30 | uml. 15 |
| Persónbilar | 200 | 200 | 110 |
| Av og áskipan, akfør | Hekku-/ bógportur | Hekku-/ hekkuportur | Hekku-/ hekkuportur |
| Tal á ferðafólki | 800/900 | 800/975 | 800 |
| Motorur (hk) | 14.300 | 20.900 | 10.080 |
| **Oljuútreiðslur** | | | |
| 2 x Tv.-Tó. Um dagin (mió. kr./ár) | 6,4 | 8,6 | 9,6 |
| 4 x Tv.-Tó. um dagin (mió. kr./ár) | 12,8 | 17,3 | 19,2 |
| **Rakstur** | | | |
| Rakstrarútr. tils. 2 x Tv.-Tó. Um dagin(mió. Kr./ár) | 30,8 | 33,4 | 34,0 |
| Mettar rakstrarinnt.2 x Tv.-Tó. um dagin (mió. kr./ár) | 13,5 | 13,5 | 13,5 |
| Nettoúrslit 2 x Tv.-Tó. Um dagin (mió. kr./ár) | - 17,3 | - 19,9 | - 21,5 |
| Rakstrarútr. tils. 4 x Tv.-Tó. Um dagin (mió. kr./ár) | 44,9 | 49,4 | 50,4 |
| Mettar rakstrarinnt. 4 x Tv.-Tó. Um dagin (mió. kr./ár) | 14,5 | 14,5 | 14,5 |
| Nettoúrslit 4 x Tv.-Tó. Um dagin (mió. kr./ár) | - 30,4 | - 34,9 | - 35,9 |
| **Byggikostnaður** | | | |
| Nýbygningsprísur Evropa (mió. Kr.) | 275 | 305 | - |
| Nýbygningsprísur Kina (mió. Kr.) | 230 | 255 | - |

*Á hesari talvuni síggjast samanberingar ímillum tað skipið, sum Bjarni Djurholm, landsstýrismaður mælti til at byggja og tað skipið, sum verkætlanarbólkurin mælti til, og sum landsstýrið samtykti at byggja. At enda kunnu hesi bæði skipini samanberast við Smyril, sum nú er. Skipið, sum verður bygt, er tað, sum siglur 21 míl. Skipið, sum landsstýrinum mælti til, er tað, sum siglur 19 míl.*

# Mugu gera nýggja havn til nýggja Smyril

**Nú landsstýrið hevur samtykt at byggja nýggja Smyril, verður tað eisini neyðugt at bøta um havnaviðurskiftini í Suðuroynni**

SUÐUROYAR-SIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í samferðslumálum, sigur, at sum er, eru havnaviðurskiftini í Suðuroynni ikki nøktandi, men at tað er eitt mál, sum má loysast samstundis, sum nýtt skip verður bygt.

– Tað nýggja suðuroyarskipið er so mikið langt, at tað kann ikki brúka havnina, sum er á Drelnesi.

Landsstýrismaðurin sigur, at Landsverkfrøðingurin hevur áður mett, at tað fer at kosta 50 milliónir at byggja ferjuleguna á Drelnesi út, so at nýggja skipið kann liggja trygt í henni. Hinvegin fer tað at kosta 75 milliónir at byggja eina heilt nýggja ferjuhavn eystanfyri havnina, sum nú er.

Bjarni Djurholm sigur, at hann nú fer at biðja Landsverkfrøðingin gera nýggari og neyvari metingar av, hvat tað kostar at gera atløguviðurskiftini í Suðuroy nóg góð.

Samferðsluhavnin stendur annars longu á langtíðarfíggjarætlanini hjá landsstýrinum. Men Bjarni Djurholm heldur, at tað er neyðugt at framskunda ætlanina at byggja havnina, so at hon er klár, tá ið nýggja skipið er liðugt.

## Neyðugt undir øllum umstøðum

Tó skal leggjast afturat, at sama hvussu tað nýggja suðuroyarskipið kom at síggja út, hevði tað verið neyðugt at gjørt nýggja samferðsluhavn í Suðuroy, tí havnin á Drelnesi hevði heldur ikki tikið ímóti tí skipinum, sum landsstýrismaðurin sjálvur mælti til at byggja.

Harafturat er tað fleiri ferðir víst á, at havnin er heldur ikki nóg trygg hjá Smyrli sum er, at liggja í. So nýggj havn skal gerast undir øllum umstøðum. Tískil er tað skeivt at blanda hesi bæði málini saman, tí tey hava onki við hvørt annað at gera.

Hetta hevur manningin á Smyrli ferð eftir ferð víst á.

Eitt nú hevur skiparin á Smyrli, Pauli Lassen, víst á í einum brævi til Strandfeðsluna í 1998, at frá 16. november í 1997 og árið út, hendi tað heilar 17 ferðir, at Smyrli sleit trossar, at teir noyddust at leggja at við gomlukei, at teir noyddust at flyta skipið á miðjari nátt, at teir ikki sluppu til kei, ella fingu aðrar trupulleikar av tí at havnin á Drelnesi er ov vánalig.

Skiparin sigur, at hetta hevur verið skilið líka síðani havnin varð gjørd.

– Umstøðunar á Drelnesi eru ótolandi, serliga tá ið eysturættirnar eru, sigur skiparin á Smyrli.

